Nr. 3/2020

Henrik Old
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi Føroya Tele, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

1. Hvussu stórt vinningsbýti hevur landskassin fingið úr Føroya Tele samanlagt síðan 2010?

Viðmerkingar:
Samgongan hevur gjørt greitt, at tað liggur frammarliga í ætlanunum at einskilja almenn partafeløg. Í hesum sambandi hevur talan m.a. verið um almenna partafelagið Føroya Tele. Um støða skal takast til, um tað er skilagott at einskilja felagið, er neyðugt við upplýsingum um, hvussu stórt vinningsbýtið úr felagnum hevur verið seinastu árini. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 10. august 2020

Henrik Old